

www.oljan.fo

**Jan Müller** 29 - 07 - 2012

# Nógv oljufeløg til Føroya finna tit olju

Verða kolvetni funnin á føroyska landgrunninum ivist eg ikki í, at nógv altjóða oljufeløg fara at koma til Føroya, sigur amerikanski sendiharrin í Danmark, Laurie Fulton, eftir at hon í vikuni lurtaði eftir framløgu um oljuleitingina í Føroyum umborð á Smyrli. Tað var ein av serfrøðingunum á Jarðfeingi, Heri Ziska, sum greiddi sendikvinnuni frá oljuleitingini í Føroyum umborð á Smyrli, tá leiðin gekk til Suðuroyar. Hann greiddi á hegnisligan og sannførandi hátt um Føroyar sum eitt av framtíðar spennandi leitiøkjunumí heiminum. Og amerikanska sendikvinnan vísti stóra áhuga fyri hesi enn ókendu føroysku vinnuframtíðini. Heri Ziska helt fyri, at góðir møguleikar eru at gera stór fund á føroyska landgrunninum, men duldi ikki fyri, at váðin eisini er stórur, nú so fáir brunnar eru boraðir. Hann helt fyri, at tað er gott fyri leitingina í Føroyum, at eitt so fíggjarliga og tøkniliga sterkt felag sum tað amerikanska Exxonmobil hevur leitað sær henda vegin  og kann vera við til at stuðla undir tað so týðandi arbeiðið, sum Statoil stendur fyri. Amerikanski sendiharrin fegnaðist eisini um, at amerikonsk oljufeløg vísa Føroyum ans. Og hon ivaðist onga løtiu í, at verða kolvetni funnin í rakstrarverdum nøgdum eitt nú í Brugdu 2 boringini, so fara nógv altjóða oljufeløg at koma til Føroya. Umframt Exxonmobil hava fleiri onnur amerikonsk oljufeløg verið við í føroysku oljuleitingini. Amerada Hess var eitt av teimum fyrstu oljufeløgunum at vísa Føroyum ans, men eisini Anadarko, Phillips, Conoco, Texacod og Chevron hava verið við í leitingini her. Mynd -  Heri Ziska frá Jarðfeingi roynir at marknaðarføra oljuleiting við Føroyar fyri amerikonsku sendikvinnuni í Danmark.